# Tey verjuleysu

**Í grein vísir Turið Jacobsen á verjuleysu støðuna hjá teimum menningartarnaðu. Gott at ljós verður varpað á henda trupulleikan, tí hann er at kalla eitt eyðkenni fyri føroyska samfelagið. Bæði fyri tey menningartarnaðu, tey sjúku og tey gomlu**

ANN HOVLAND

sjúkrasystir E3

Í grein í Sosialinum vísir Turið Jacobsen úr Svínoy á, hvussu beiggin á almennum stovni er verjuleysur, tá ið trupulleikar stinga seg upp og hvussu manglandi rættindini hjá einum menningartarnaðum gera, at hann ikki fær umstøður at mennast.

Hon vísir eisini á, hvussu hesi rættindini í Danmark eru orðaðar fyriskipanir og at tú sum avvarandi í Føroyum kennir teg hjálparleysan, tá ið tú skal veita einum, tú varðar av, hjálp.

**Vælferð bert fyri teimum frísku og røsku**

Gott at hetta mál verður tikið upp til viðgerðar, tí hetta er helst ein nógv størri trupulleiki, enn tú gert tær far um í gerandisdegnum, um tú ikki ert ein av teimum, sum manglandi rættindi og hjálp rakar.

Hygg bert at teimum gomlu, sum hava lagt lunnar undir tí vælferð, vit í dag breggja okkum av - men væl at merkja bert vælferð fyri okkum frísku, sum ikki tørva hjálp og umsorgan.

**Manglandi rættartrygd og viðgerð**

Ert tú sjúkur, hevur tú onga rættartrygd, tí myndugleikarnir ikki fáa upp í lag at seta eina lóg um patienttrygd í gildi.

Ert tú raktur av heilabløðing ella blóðproppi, fært tú ikki tað neyðugu viðgerðina beinanvegin, sum er neyðugt, um tú skal hava møguleikar at koma teg.

**Ongin upptrening**

Og ta viðgerð, tú kanst fáa í 50 ára gomlu fyribils barakkunum við J. C. Svabosgøtu stendur ikki mát við ta viðgerð, tú kanst fáa í grannalondum okkara, sum vit errin samanlíkna okkum við. Ikki orsakað av ódugnaligum, men manglandi stavsfólkum - bæði ergoterapeutum, fysioterapeutum og sjúkrasystrum. Um neyðugu starvsfólkini vóru sett, hevði ikki verið neyðugt at sent patientarnar av landinum, tí viðgerðin tá hevði verið eins góð og uttanlanda. (Mær dámar ikki orðið sjúklingur, tí alt sum endar við "lingur" á føriskum er lítið, meðan patientur kemur av enska orðinum patient, sum merkir tolin).

Tú verður so útskrivaður - ikki tá ið tú kanst klára teg, men tá ið tey avvarandi kanska so dánt klára at vera um teg, men hjálp og framhaldandi upptrening er ein býur í Kina.

Nei so heldur í sjálvsøkni og hugmóði senda dønum 366 mió. kr. aftur hvørt tað einasta árið, tí at vit frísku kunnu klára okkum uttan henda peningi.

**Visión 2015??**

Segði nakar visión? Og segði nakar visión 2015? Eitt samfelag, sum ikki veitir rættindi, verju og hjálp til tey menningartarnaðu, tey sjúku og tey gomlu er eitt visónsleyst samfelag. Byrjið her, um tit meina nakað við tey fínu orðini.

# Starvsfólkarøkt – hví tað?



BERGTÓRA H. JOENSEN

Tjóðveldi

Hugaligt at hoyra tær báðar hollu Marjun Eystberg og Ásvør Skaalum tosa um starvsfólkarøkt í Degi og Viku. Og ein kann ikki annað enn at fegnast um, at ljós verður varpað á hetta týdnaðarmikla øki.

Sum HR-mennari í Eik havi eg samstarvað við nógv spennandi almenn og privat arbeiðspláss. Og sigast má, at stórur munur er á, hvør hugburðurin til starvsfólkarøkt er á ymsu arbeiðsplássunum.

Summi spyrja um hetta við starvsfólkarøkt og trivnaði er ein poppsmartur trendur, ella um tað veruliga komið fyri at vera. Eg í myndi mær, at starvfólkarøkt og trivnaður er komið fyri at vera, og fleiri orsøkir eru til tess.

Tað vísir seg nevniliga, at starvsfólk sum trívast væl:

Skifta ikki arbeiðspláss, líka javnan sum onnur

Hava færri sjúkradagar enn onnur

Fáa meiri frá hondini, eru effekivari

Gera færri villur

Tekkjast nýggjari arbeiðsmegi

Øll vita vit, at landinum tørvar arbeisðmegi og at arbeiðsloysið er metlágt. Tí er talan um eina vinn/vinn støðu hjá øllum pørtum um og starvsfólkarøkt verður raðfest. Hóast fleiri almenn og privat arbeiðspláss virka fyri einari góðari starvsfólkarøkt, er enn langt á mál í fleiri førum.

Skilabest hevði tí verið, um ein verulig trivnaðarætlan bleiv raðfest. Eg meini, at vit politiskt áttu at játta pening til eina trivnaðarætlan.

Kapping er um bestu starvsfólkini, og tað er ein sannroynd, at hjá nógvum skal ikki so nógv til, fyrr enn tey leita sær eftir nýggjum avbjóðingum. Kanningar vísa, at tað tekur umleið 2 ár at læra eitt starvsfólk upp. Tað vil siga, at tað kostar einum arbeiðsplássi nógvan pening, hvørja ferð eitt starvsfólk velur at siga upp. Trist at hugsa um, ikki minst innan almanna – og heilsuøki har fíggjarætlaninirnar sum er eru skornar inn á bein.

Ein partur av starvsfólkarøktini nýtist ikki at kosta so nógvan pening. Tað veri seg jaligur andi, viðurkenning, ávirkan á arbeiðsdagin og raðfesting av uppgávum. Men tá talan er um menning, so sum eftirútbúgving og skeiðir kostar tað sjálvsagt. Hoyrdi ein fyrilestur hjá HR-stjóranum hjá TDC. Hon hevði hendan hugburðin til førleikamenning: "Der er mange der spørger, hvorfor vi dog bruger så store summer på videre –og efteruddannelse, for hvad hvis folk forlader os efter endt uddannelse. Jeg mener, at alternativet ville være værre. Altså hvis folk forblev hos os, uden at blive klædt optimalt på til at løse arbejdsopgaverne!"

Ja, verulig starvsfólkarøkt er av sonnum enn eitt dømi um, at tað eru **bleytu virðini sum skapa hørðu úrslitini**!

# Álop heldur áfram á minniluta bólk

SÓLBORG DULAVÍK



Nú nærkast aftur til val, og nú skal sessurinn á tingið ella í landstýrinum verjast. Um somu tíð seinasta ár, vóru tað teir báðir Kartin Hansen og Alfred Olsen og onkur annar við, sum brúktu kristindómin og bíbliuna til at verja síni sjónarmið viðvíkjandi grein 266 b. Málið snúi seg um tey samkyndu, sum skuldu fáa fest niður síni rættindi móti happing.

Teir gjørdu nógv rumbul, serliga innan fyri tann flokk teir vóru valdir inn í. Vit minnast jú øll at Kartin Hansen valdi at fara úr Tjóðveldinum og inn í Miðflokkin, og Alfred Olsen hótti við ymiskum.

At tað ber til at skapa sær so, tá málið var fari fram á demokratiskan hátt, er ófatiligt. Meintu teir nakað álvara við tí, fóru teir úr tinginum – so hevði eg, í hvørtfall, havt virðing fyri teimum. Men nei, so nógv vildu teir ikki gjalda fyri sakina. Hettar eru teir sum siga seg verja okkara kristna støði í hesum landi – álvaratos. Tá tað kemur til makt og pengar er ongin munur á okkum.

Fólkaflokkurin er í samgonguni, við Jógvan á Lakjuni sum mentamálaráharra. Nú skeiðið er við at renna út, kemur mentamálaráðharrin við einum "stórmáli"og vil trýsta allan Fólkaflokkin at standa saman fyri at forða skráðsett parlag. Hevur Fólkaflokkurin einki annað stór mál at standa saman um?

Okkurt annað mátti verið sum liggur á láni, eftir hesi 4 árini tit hava siti. Studentarskúlin í Hoydølum er gott dømi um hvussu raðfest hevur verið. Tit hava syrgt væl fyri tykkum og tykkara, eisini fyri framtíðini, meðan annað liggur í skeljasori.

Hettar afturvendandi álopið á ein minniluta bólk, upplivi eg sum rein forfylging. Her blívur bíblian brúkt sum grundarlag fyri etikkini. Men eg sakni sakligar grundgevingar fyri tíni rættindi til at viðgerða ósek fólk út frá nøkrum ávísum fáum versum. Hettar er beinleiðis í stríð við tí eg lesi og tulki í bíbliuni og serliga ódámligt er tað, tá ein hevur fatan av at tað verður gjørt fyri egna vinning.

Í halgubók eru óteljandi vers sum minna okkum á hvussu vit sum kristin eiga at liva í gerandisdegnum og at hvør einstakur hevur ábyrgd av at svara fyri seg á tí eina degi.

Jól standa fyri durum og ynski mítt skal verða at vit øll kunnu fáa eini góð og hugnalig jól.

# Vinningur fyri øll

ZAKARIAS WANG



Hildið verður, at tingsamtyktin um tunlar til Suðuroyggjar okkara er ein vinningur fyri tey, sum har búgva.

Sjálvandi er tað rætt, men tað eru sanniliga ikki bert tey, sum fáa nakað burturúr.

Vert er at hava í huga, at øll tey, sum búgva í meginøkinum, við hesum tunlum fáa eitt størri vegakervi at koyra á. Víðari bilurin kann fara, meir gleði og gagn fæst burtur úr honum, og tí er hvør einasti bileigari í Føroyum vinnari í hesum máli.

Verður hugt eftir Føroyakortinum sæst, at tann dag vit kunnu koyra millum Tórshavn og Tvøroyri, er hesin teinur bert fýra kilometrar longri enn leiðin frá høvuðsstaðnum til Vestmanna. Tá eru allar Føroyar ein eind. Vinnulívið kann gera íløgur í virki har tað loysir seg best, og fólk kunnu búgva har teimum dámar best.

Føroyar gerast eitt nógv betri land at búgva í hjá okkum øllum, og tí eru vit øll vinnarar.

# Hvat ynskir tú tær í jólagávu?

ELIN N. W. TAUSEN



Ein undirsjóvartunnil kanska? So ert tú ikki øðrvísi enn tey flestu. Sandoyingar hava fingið gávukort uppá sín, meðan fólk á Hesti hava fingið vónina aftur. Eystuoyingar ganga og bíða eftir sínum tunnli, ið skal hava rundkoyring og fara upp á Strondum og við Toftavatn.

Eisini verður tosa um tunnil til Suðuroyar, tá skal Skúvoy nok eisini takast við. Eisini verður tosað um undirsjóvartunnlar millum onkra av Norðoyggjum og so mugu vit ikki gloyma hann út í Nólsoy til nýggja altjóða flogvøllin!

"Halló!" Er tað onging sum vaknar? Er tað ongin, sum kann sláa kalt vatn í blóðið og síggja, at loysnin fyri føroyska samfelagið er ikki bara at gera ein undirsjóvartunnil!

Vit eru 48.000 fólk, og framskrivingar hava víst, at vit skulu ikki vænta tann stóra fólkavøksturin. Hvussu skulu vit kunna klára okkum, um vit binda fíggjarlógina niður í 10 tals av árum, fyri at gjalda undirsjóvartunnar til næstan hvørja útoyggj, tí vit skulu reka útoyggjapolitikk?

Eg hevði ynskt, at vit kundu bundið allar Føroyar samman, so livdu vit lukkuliga "til vores dagers ende", men soleiðis er bara í ævintýrum. Okkara polittikkarar hava skyldu til at liva í veruleikanum og taka avgerðir, sum eru øllum at frama. Hvat við øllum teimum tunnlunum og vegastrekkjunum, sum vænta at verða hildnir við líka? Og ikki at gloyma allar tær menniskjalagnur í Føroyum, sum líða undir, at vit ikki hava nóg góðar skipanir, sum tryggja teimum virðilig kor?

Vit sum eiga børn vita at í hesum jóladøgum, ynskja børnini sær mangt og hvat, og ikki ber til at geva teimum alt tey ynskja sær. Men vit royna at gera okkara besta fyri at geva teimum eina gávu, sum ikki fer at koppa húsháldinum. Tí vit skulu eisini klára at liva í 2008.

Góðu tit menn og kvinnur, ið eru vald til at umsita hetta land, vit kunnu ikki gera alt, men vit kunnu gera nakað og loysin eitur ikki "altíð" ein undirsjóvartunnil.